# Føroya Ríðingarfelag 60 ár – ein hugleiðing

**Viljormur Tórsheim**

Týsdagin 25. februar fylti Føroya Ríðingarfelag 60 og sum skilst ætlar felagið at hátíðarhalda dagin.

Tað vóru tríggir ríðimenn, í tí yngra endanum tá her í Havn, sum tosaðu saman um at stovna eitt ríðingarfelag fyri líkasum at samskipa í ein felagsskap tey áhugamál, sum vóru tengd at tí gomlu ríðimentanini, sum var í Havn og hesir vóru Aksel hjá Poul Hansen, Jens Pauli av Reyni og Leivur T. Hansen.

Boðað var til stovnandi fund um hetta mál við soljóðandi lýsing í Dimmalætting í februar mánaða 1943.

***»Til øll ríðiáhuga fólk***

***Ætlanin er at stovna eitt ríðingarfelag í Havn við hesum høvuðsendamálum.***

***I. Fremjing av ríðingini***

***II. Viðlíkahald av ríðigøtum***

***III. Fyrireiking av kappríðingum***

***Stovnandi aðalfundur verður hildin í Tórshøll hósdagin 24. feb. 1943 kl. 7 um kvøldið.***

***Ríðiáhuga Havnafólk og bygdafólk við biðast møta fjølment.***

***Stovnararnir«***



*1941 – maðurin í føroyskum klæðum við flaggstong er Vilhelm Tórsheim, drongurin nærmast við hann er Andrias Arge (Diaba hjá Liffu), við hansara lið er tað Trygvi Sondum. Maðurin við yvirfrakka og stórum hatti er Hans Andrias Djurhuus og millum Hans Andrias og Trygva sæst maður við keppi, eisini kallaður kolli á høvdinum er Poul Petersen fyrrverandi løgtingsmaðurin úr Funningi*

Fundur varð hildin og væl av fólki var møtt upp, viðtikið var, at stovna felagið og at tað skuldi nevnast Føroya Ríðingarfelag.

Nevnd bleiv so vald og í fyrstu nevnd felagsins blivu hesir valdir. Aksel hjá Poul Hansen, Jens Pauli av Reyni, Leivur T. Hansen (Leivur hjá Trónd), Tummas Rubeksen, (Tummas hjá Hanusi) og Eivin Evensen.

Petur Sofus Hansen bleiv valdur til grannskoðara.

Nevndin skipaði seg sjálv og valdi hon Jens Paula av Reyni til formann og var hann sostatt fyrsti formaður felagsins.

Tað hevur altíð verið so her í Havn, at ríðifólk hava bestaði av klikum, sum so mangan hava ymiskar áskoðanir av tí sum fyriferst, bæði í samfelagnum go eisini mann og mann ímillum og harav verður so ein gevandi andi til tosið, eisini millum klikurnar fyri at kunna fáa fram eina gevandi diskusjón.

Í so máta var hesin stovnandi aðalfundurin einki undantak.

## Tórshøll

Fyri góðan ordansskyld skal her sigast frá, at nú skulu vit ikki fara at blanda begrebini.

Tá greitt verður frá, at stovnandi aðalfundur var hildin í Tórshøll so er tað ta gamla og upprunaliga Tórshøll sum Anna Sam átti í Niels Finsensgøtu og ikki tað Tórshøll sum nú liggur á horninum Tróndargøta/-Sverrisgøta, sum man fyrr hoyrdi umtalaðan sum ein meir ella minni respekteraðan ølklubba, men sum nú undir góðari leiðslu hevur givið øllum húsinum ein ordiligan »make up« bæði innan og uttan og harvið lyft tað uppá eitt hægri og meira respektera støði.

Ja so høgt sigst, at nú hevur tað lætta Kavelaríið trupulleikar at sleppa inn.

## Stovningarsamtyktin

Ikki kann sigast annað, enn at tey mál sum man setti sær fyri á stovnandi aðalfundi í 1943 hevur felagið megnað rættiliga væl at framt.

Her skal tó takast nakað fram, sum eisini hevur siðsøguligan týdning og tað er viðlíkahald og at hampa um tær gomlu gøturnar eins og man eftir fyrimuni hevur roynt at givið tí yngra ættarliðnum innlit í staðarnøvn og onkra hending á teim leiðum, sum ríðingarmenn ferðast á, eins og í teim leiðum sum liggja framvið teirra ferðir.

Tað hevur ligið rættiliga fast í áravís í mai mánað, at menn nøkur kvøld hava tikið seg saman um at rudda og hampa um gøturnar.

Meg minnist tað eina kvøldið, tá høvdu nakrir gjørt av, at eitt stórt og keðiligt díkið sum tánverri lá soleiðis fyri, at man mátti fara um tað, um tú vildi ella ei, at nú kundi tað vera nokk, nú skuldi hatta forbrenda díkið fáa av at vita. Næsta kvøld var so farið í holt við díkið og menn drivu á fyri at fáa skil á tí.

## Humanisma ella satira

Tað passaði seg soleiðis, at tað var um ta mundi, tá handa lógin um mvg. var sett í gildi av nøkrum so klókum monnum, sum tá ráddu fyri borgum her á landi, alt til frama fyri land og fólk skuldi hetta góða mvg. blíva til, hoyrdi man.

Diskussiónin var lívlig tað kvøldið um hetta góða mvg. og menn blivu eitt sindur heitir.

Teir blivu so lidnir við díkið, teir høvdu jú drivið á alt kvøldið og stóðu nú troyttir og skoðaðu verkið.

Tað var faktiskt sum ein autostrada man hevði gjørt.

Menn sóu seg sjálvan í ondini fara drønandi yvir um tað, hvat ið onkur ørvitis knokkur við góðari kenning fyrr hevði gjørt.

Knappliga letur í einum, at nú máttu vit seta navn á hettar valaverkið, sum vit nú høvdu gjørt og hyggur rundanum seg. Einki problem letur í einum øðrum, vit kalla tað bara fyri mvg. díkið og tað bleiv viðtikið á staðnum.

Væl hevur tað hildið sum vit á sinni gjørdu við hattar mvg. díkið, men nú noyðast vit aftur í holt við tað. Og líkavæl hevur handan mvg. lógin hildið, sum vistnokk meginparturin av føroyingum ynskja har sum piparið grør.

## Hestahús og ríðivøllur

Eisini hestahús til rossini hjá limunum hevur felagið megnað at gera úti í Havnadali. Men her skal tó tað skoytast uppí, at teir av limunum sum fingu tilsøgn um bás í hesum húsi hava sýnt góðan vilja og lagt nógv arbeiði í at byggja tey.

Og í sambandi við hesi hesahús hevur felagið megnað at gera ríðivøll í nánd av húsunum, so tað er høgligt tá líkindi eru at fara sær ein stuttan túr við hestinum fyri at motionera hann.

Eisini felagshúsi hevur felagið klára at byggja har úti. Øll arbeiðsmegin var uppá frívilligan basis og her eiga nokk so nógvir av felagsins limum rós og tøkk fyri tað arbeiði, sum teir hava lagt í hetta hús.

## Útibarnagarður

Tá tosið tók seg upp her í Havn um útibarnagarðar, tí man vildi sum eina roynd finna útav um tað kundi bøta um heilsuna hjá børnunum, kom Havnar Kommuna og Føroya Ríðingarfelag ásamt um leigumál av felagshúinum til hetta endamál, tí húsið lá so væl fyri úti í náttúruni.

Her er bæði seyður, ross, gæs og heiðafuglur, nokkso stór á undir liðini, stutt at fara niðan í hagan við børnunum ella oman í dalin, har ein uppaftur størri á er at ganga framvið. Seinast men ikki minst øll smálombini og nakað av skrambli hjá ríðimonnunum.

Børnini trívast væl, eru bæði frísk og røsk, eta tað sum sett verður á borði. Ríðifólkið sleppur eisini at gera brúk av húsinum tá eingi børn eru. Vit halda til í køkinum, kóka okkum ein drekkamunn, har er bæði borð og benkir at sita á, meðan man fær sær eitt hugnaligt prát. Allir partar vælnøgdir.

Ein kappríðingarvøll uppi á Marknagili hevur felagið eisini klára at gera. Tað bleiv byrjað uppá hann seinnapartin í seksti árunum og ein stórur partur bleiv eisini her gjørdur av einum trúgvum flokki av limum í felagnum.

## Undangongumenn og hugsjónarmenn

Á ólavsøku í 1941 fór fram ein stórhending her í Havn, sum setti ein nýggjan og serligan hátíðarligan dám á alt ólavsøkuhaldið. Tað vóru teir tríggir ríðimenninir úr Havn, kjartan Mohr, Edvard Samuelsen og Vilhelm Tórsheim, sum høvdu tikið seg saman um at fáa ólavsøkuhaldinum eitt meira fjølbroytt innihald.

Teir høvdu tað áskoðan, at tað líkasum manglaði nakað hátíðarligt og tignarligt í byrjanini av ólavsøkuhaldinum. Nakað sum kundi samla ólavsøkufólkið og líkasum lyfta tað upp í eina hægri samlandi og gevandi eind.

Ja vøkur er sjónin ólavsøkuaftan tá ítróttarskrúðgongan kemur oman eftir Niels Finsensgøtu við ríðimanni á hestbaki á odda berandi Merkið frammanfyri Havnar Hornorkestur og alt ítróttarfólkið aftaná.

Men væl er fyriskipað og mangan trongligt, men mannamúgvan hevur altíð givið seg sundur og givið pláss alt eftir ávísing av løgregluni, sum her skal fáa eitt herðaklapp fyri sín leiklut.

## Aftur til 1941

Teir tríggir Kjartan Mohr, Edvard Samuelsen og Vilhelm Tórsheim vóru blivnir samdir um, at heita á allar ríðimenn her í nánd um at koma í skrúðgongu á hestbaki ólavsøkuaftan við hornblástri á odda at ganga gjøgnum býin og enda á Tinghúsvøllinum.

Boð vórðu send bæði í eystur og vestur á ríðimenn um at koma við. Allir skuldu vera í hvítari skjúrtu og svørtum slipsi og møtast skuldi man kl. 2 ólavsøkuaftan í túninum frammanfyri húsini hjá Andrias í Horni bakara niðri í Bøgøtu.

Upplýst var eisini, at Hans Andrias Djurhuus skuldi halda røðu á Tinghúsvøllinum. Teir høvdu lagt honum eina við, um ikki at koma inn á politik, tí teirra áskoðan var, at ólavsøkan var søgulig.

Stórt sæð hava allir klára at halda hetta, sum hava hildið røðuna ólavsøkuaftan á Tinghúsvøllinum, uttan tann eini, sum nú fyri stuttum tíanverri ikki kundi halda sær og breyt tað gomlu siðvenjuna.

## Fara til gongu

Skrúðgongan var soleiðis fyriskipað, at fremstur gekk Vilhelm Tórsheim í føroyskum klæðum berandi flaggstong við tí føroyska flagginum á, aftaná honum komu nakrir so fittir smádreingir, berandi hvør sítt lítið føroyskt flagg á lítlari og fittari stong sum var púra ókent tá. Allir vóru snákaðir upp heima ífrá, tí hettar var nakað heilt nýtt og stórsligið sum teir skuldu vera við til.

Síðani kom Havnarorkestrið og aftaná tað ríðimenninir við Kjartan Mohr og Edvard Samuelsen á odda síðani restin av ríðimonnunum tveir og tveir lið um lið.

So var farið til gongu oman ímóti smiðjuni, til vinstru eftir Grím Kambansgøtu, framvið gamla Danmark oman í Vágsbotn, niðan ígjøgnum Kirkjubrekkuna eftir Bryggjubakka, niðan Bringsnagøtu og oman á Áarvegin, niðan eftir Áarvegnum framvið grótgarðinum hjá Lützen og Anton Degn, har bleiv steðgað og rossini blivu stillað við reyvini ímóti grótgarðinum eins og tey blíva tað enn av trygdarávum.

Væl av fólki var komið saman á Vaglinum, tíðspunktið passaði jú sera væl. Tað var jú tætt, áðrenn kappróðurin so fólk vóru líkasum klár at fara í búin.

Hetta var jú nakað spildurnýtt og fólk vóru eitt sindur forvitin, vildu gjarna hava alt við, tí tá var ikki so nógv at fara til á Ólavsøku.

Hans Andrias Djurhuus helt eina megnar røðu undir Tinghúsvegginum og enda bleiv við at man sang »Eg oyggjar veit« og við hasum endaði tann fyrsta ítróttarskrúðgongan á ólavsøku í Havn.



*Ólavsøkuaftan 1943. Ríðimenninir eru komnir oman eftir Tórsgøtu og eru á veg niðaneftir Mylnugøtu móti Vaglinum. Vit kenna nakrar av teimum. Fremstur til høgru Sámal Patursson (sonur til Gaset á Kirkjubø) William Dam, Karl Johan Mikkelsen, Viljormur Tórsheim og Janus Djurhuus. Aksel Hansen kenna vit eisini og aftast Dánjal í Búðini og Sverri Trónd. Í vindeyganum í erva hjá Heinesen er fult at ekspeditrisum og viðskiftafólki og húsið til høgru, sum nú er burtur, er tað gamla læknahúsið eisini kallað Fysikushúsið*



*Í mong harrans ár var Sverri Trónd fastur at ríða á odda, sum flaggberari, her situr hann á ryssuni Hállu, sum hann átti og bar hon orð fyri at vera sera klók. Flaggberarin til vinstru aftaná er Torbjørn Mikkelsen (Tobbi) og hin til høgru við 7-talinum á høgra læri er Kári Thorsteinsson. Myndin er allarhelst frá fyrst í sekstiárunum*